## Burtur við píkadekkum

Vegamyndugleikarnir í Tromsø í Noregi ætla sær nú undir eitt átak, sum skal fáa bileigarar at sleppa píkadekkunum. Myndugleikarnir siga, at bara á Tromsøbrúnni skræða píkadekkini 50 tons av asfaltdusti upp á hvørjum ári, og at dustið er sera heilsuskaðiligt og serliga fyri børn, eldri fólk, barnakonur og sjúk fólk. Sambært vegamyndugleikunum eru tað bara 9 prosent av bilunum í Tromsø, sum ikki brúka píkar. Til samanberingar verður víst á, at í Tróndheimi og Alta koyra ávikavist 79 og 60 prosent av bilunum uttan píkar.



## Nógv hús til sølu

Ongantíð hava so mong hús og íbúðir staðið til sølu í Danmark sum nú. Realkreditráðið sigur, at í august vóru 65.000 bústaðir til sølu, og tað er 20 prosent meiri enn í august í fjør. Tað eru serliga hús og raðhús, sum koma á marknaðin nú. Av hesum vóru 39.000 til sølu í august, og tað var 30 prosent meiri enn í saman mánaði í 2007. Harafturímóti vóru færri íbúðir til sølu. Realkreditráðið sigur, at í síðsta mánað vórðu eini vanlig sethús og raðhús lýst til sølu fryri 16.766 krónur fyri fermeturin í meðal.

# Nýggjar kloakkir í Nólsoy




*Maskingrevstur við Frank Helllisdal byrjaði at gera nýggja kloakkskipan í Nólsoy beint undan summarfrítíðini. Arbeiðið skal eftur ætlan verða liðugt í mars komandi ár*

*Mynd: Michael Thomsen*

**Fyri nøkrum árum síðani gjørdi núverandi Umhvørvisstovan eitt uppskot til eina kunngerð sum legði upp til, at allar kloakkir í landinum skuldu lúka ávís krøv. Millum annað skuldi allar kloakkir leiðast út á streymasjógv, og hetta skuldu kommunurnar fáa í lag innan ár 2010**

KLOAKKSKIPAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í 2003 gjørdi núverandi Umhvørvisstovan eitt uppelegg til eina kunngerð um rætningslinjur í sambandi við útleiðing av spillvatni hjá kommunum. Men nú, fimm ár seinni, er kunngerðin framvegis ikki sett í gildi.

Kortini arbeiða fleiri kommunur eftir rætningslinjunum í uppskotinum hjá Umhvørvisstovuni, sum inniheldur fleiri kriteriir, har tey mest umráðandi eru, at alt spillvatn skal reinsast, áðrenn tað verður leitt út á streymasjógv. Sama uppleggið hjá Umhvørvisstovuni leggur upp til, at kommunurnar fáa hetta framt innan ár 2010.

Ein av kommununum, sum hevur tikið hesar rætningalinjur til sín, er Tórshavnar kommuna.

- Tá vit tóku við í 2005 settu vit okkum fyri, at fáa útint málsetningin, sum lagt verður upp til í ætlaðu kunngerðini. Vit hava brúkt einari 15-18 milliónir krónur um árið til hetta endamálið og rokna við, at hava brúkt einar hundrað milliónir krónur, tá komið er á mál, sigur Marin Katrina Frýdal, forkvinna í Teknisku nevnd hjá Tórshavnar kommunu, ið umsitur kloakkir.

Kommunan hevur lagt stóra orku í júst hetta, at reinsa áirnar, har kloakkir fyrr nærmast fyrilitarleyst eru leiddar út í.

- Vit hava t.d brúkt nógvar milliónir krónur uppá at reinska Rættará, sum rennur heilt úti frá Marknagili, og leitt spillvatnið út á streymasjógv. Djúpagilsá og Sandá eru nú vorðnar heilt reinar og hetta prógva eisini síðstu úrrslitini frá vatngóðsku royndunum ið júst í hesum døgum eru lagdar fram. Arbeiðið við at reinska Hoydalsá er í gongd og fer samlaður kostnaður fyri tað upp um 15 mill. kr. Sum heild hevur kloakkætlanin gingið ógvuliga væl og eri eg sera nøgd við at politisk undirtøka fekst fyri hesum annars sera lágt raðfesta øki. Vit eru ikki komin heilt á mál enn, nakað er at gera á Velbastað, í Kirkjubø, í Kollafirði og á Argjum, sigur Marin Katrina Frýdal.

### Hest og Nólsoy

Beinanvegin í 2005 fór Tórshavnar kommuna undir at reinsa kloakkirnar í Hesti – sum kom upp í komununa sama árið – og leiða tær út á streymasjógv.

- Tað var eisini ein kostnaðarmikil uppgáva, men kortini ikki á leið so dýr verkætlan, sum hon vit eru í holt við úti í Nólsoy í løtuni, sigur forkvinnan í Teknisku nevnd.



*Marin Katrina Frýdal er forkvinna í Teknisku nevnd í Tórshavnar býráð*

Í Nólsoy hava hingartil verið leidd sjey útleyp á víkina, beint út har sum børn spæla á sandinum. Kommunan er farin í holt við at gera eina heilt nýggja kloakkskipan við reinsiverki, pumpuverki og útleiðing av kloakkunum norðanvert Kirkjutanga út á streymasjógv.

- Hetta er ein verkætlan, sum fer at kosta sjey milliónir krónur, og tað er ein stór íløga, sigur Marin Katrina Frýdal.

Hon ivast stórliga í, um gamla Nólsoyar kommuna sum sjálvstøðug kommuna hevði megnað eina so stóra íløgu.

- Kloakkir hava heldur ikki havt ta høgu raðfestingina millum politikarar, so spurningurin er, um hendan verkætlanin annars hevði verið framd. Og nær, sigur Marin Katrina Frýdal.

Hon vísir á týdningin av einum reinum umhvørvi, ikki mist inni á víkum og havnum.

- Børn ganga jú og spæla á sandinum, og tá heilar sjey kloakkir renna út í havnina í Nólsoy, so má tað gerast skiti, og tað er jú beinleiðis heilsuskaðiligt fyri børnini, sigur Marin Katrina Frýdal.

Arbeiðið at gera nýggja kloakkskipan byrjaði beint fyri summarferiuna og verður væntandi liðugt í mars mánaði komandi ár.

Tað er Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, sum hevur arbeiðið um hendi.

## Kanna kunngerðina

Tá Sosialurin í morgun hevði Helenu Dam á Neystabø í telefonini, var hon ikki inni í málinum. Men hon vónaði, at talan var um okkurt »bagatall« sum kundi loysast í eini handavending, so kunngerðin skjótast gjørligt kundi setast í gildi.

Sambært Jóhonnu Olsen á Umhvørvisstovuni var uppskot til kunngerð latið Innlendismálaráðnum í 2003, men málið hevur eftir øllum at døma ligið í onkrari skuffu og er ikki komið víðari síðani.

Vit venda væntandi aftur til málið í blaðnum í morgin.

**lp**